

**Skjóttgangandi bátur av slagnum TG 6400**

- 22' fót glasfiber við rúmligari cabinu og hevur dekk aftan og framman
- 105 hk volvo penta turbo diesel
- topfartur er 32 míl
- er útstýrdur við Ekkolodd, Radara, GPS páttara & VHF
- í fínasta standið

**TIL SØLU við vogni**
Ring tlf. 212789



Sosialurin 341800



**Ford Probe**
**2500cc • V6 • 24V • 189HK**

ABS bremsur, Airbag 2 stk., Aircondition, Alarmur, Alu-felgur, Centrallás, El-innstilling av forlyktum, El-spegl, El-rútar framman, Fartpilot, nýtt Pioneer anlegg við bass og cd boks og forsterkara, Innstilling av ratti, Power-stýring, Tokulyktir, Tráleyst centrallás

Bilurin er vælhildin ring um nærri upplýsingar um bilin og prøvikoyring á tel. 262 480.

**Til sølu fyri**
**149.995,-**

Sosialurin

## Skúlastýrisval

**Felagsskúlin á Oyrarbakka**

Vallistin til skúlastýrisvalið 25. mai 2004 liggur frammi á skrivstovu skúlans og kommunuskrivstovunum í økinum.

Fólk, sum ikki eru á vallistanum, og sum hava valrætt og valbæri, skulu venda sær til skúlan í seinasta lagi 18. mai við undirskrivaðari váttan fyri at koma á vallistan.

Uppstillingarfundur verður í Felagsskúlanum mikukvøldið 12. mai kl. 20 og ikki, sum lýst í brævi til foreldrini.

**Valnevndin f. Felagsskúlan**

## Skúlastýrisval

**Kvívíkar skúli**

Vallistin til skúlastýrisvalið týsdagin 25. mai 2004 liggur frammi á skrivstovu skúlans og á kommunuskrivstovuni til 14. mai 2004.

Tey, sum ikki eru á vallistanum, og sum hava valrætt, skulu venda sær til formannin í valnevndini ella til kommunuskrivstovuna í seinasta lagi 18. mai 2004, við undirskrivaðari váttan fyri at koma á vallistan.

**Valnevndin**

**Frá Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag**

Lýsti ársaðalfundurin verður fríggjakvøldið 7. mai kl. 20.00 í "Virkinum" á Sandi

Umboð flokksins í landsins leiðslu verða við.

Eisini verður kaffi og burturluting.

*Nevndin*

www.javnadarflokkurin.fo

## Handil til sølu

Um hóskandi boð fæst er handilin Hugflog og Kirkjutorgið til sølu saman ella hvør sær.

**Áhugað kunnu ringja á tlf. 756559**



**Mitsubishi Shogun**

2,5 TD • 4x4
Árg. 1989 • Nýsýnaður
Góðk. til 4 pers.
Verður seldur um hóskandi boð fæst

**Tlf. 225 821** (eftir kl. 17.00)

## Skúlastýrisval

**Leirvíkar skúli**

**Vallistin til skúlastýrisvalið 25. mai 2004 liggur frammi á kommunuskrivstovuni frá 30. apríl til og við týsdagin 18. mai 2004.**

Fólk, sum ikki eru á vallistanum, og sum hava valrætt og valbæri, kunnu venda sær til kommunuskrivstovuna við undirskrivaðari váttan **í seinasta lagi týsdagin 18. mai 2004.**

**Uppstillingarfundur verður í stovu 5 í skúlanum í dag hósdagin 06. mai kl. 19.30.**

Á uppstillingarfundinum verða foreldrini kunnað um valið og fáa høvi at umrøða spurningar í hesum sambandi. Uppskot um valevni skulu vera valnevndarformanninum í hendi í seinsta lagi týsdagin 18. mai kl. 18.00.

**Leirvíkar Kommuna**

**Toyota - dele**
brugte og nye
Vi sender hver dag til Færøerne
AABENRAA AUTOGENBRUG
TEL (+45) 74 61 41 10
FAX (+45) 74 61 41 64
www.dkauto.dk · salg@dkauto.dk

Sosialurin 341800



## Skúlastýrisval

**Leirvíkar skúli**

**Vallistin til skúlastýrisvalið 25. mai 2004 liggur frammi á kommunuskrivstovuni frá 30. apríl til og við týsdagin 18. mai 2004.**

Fólk, sum ikki eru á vallistanum, og sum hava valrætt og valbæri, kunnu venda sær til kommunuskrivstovuna við undirskrivaðari váttan **í seinasta lagi týsdagin 18. mai 2004.**

**Uppstillingarfundur verður í stovu 5 í skúlanum í dag hósdagin 06. mai kl. 19.30.**

Á uppstillingarfundinum verða foreldrini kunnað um valið og fáa høvi at umrøða spurningar í hesum sambandi. Uppskot um valevni skulu vera valnevndarformanninum í hendi í seinsta lagi týsdagin 18. mai kl. 18.00.

**Leirvíkar Kommuna**



# ítróttur

Nr. 86 • hósdagur • 6. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Kanska seinasta vitjanin á Scilly

**Føroyska bátsmanningin á bátinum Atlantic, sum tóku lut í árligu róðrarkappingini á Scilly-oyggjunum um vikuskiftið, er sera væl nøgd við úrslitið. Tó harmast tær um, at hetta var kanska seinasta føroyska luttøkan á Scilly**


RÓÐUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Um vikuskiftið tók ein føroysku kvinnumanning lut í árligu kapprógvingini á Scilly-oyggjunum. Tær sjey kvinnurnar mannaðu bátin Atlantic, og tá ið kappingin var av sunnudagin endaðu tær á einum sera heiðurligum sættaplássi millum teir 90 luttakandi bátarnar.

### Sera væl nøgdar

Kerstin Rasmussen, ein av føroysku rógvarunum, sigur, at tær eru sera væl nøgdar við úrslitið á Scilly. Tað var manningin á 6-mannafarinum Jarnbardi úr Havn, sum vann sær rætt til at taka lut í kappingini á Scilly-oyggjunum, men tað var beinan vegin greitt, at tað ikki lá fyri hjá øllum kvinnunum umborð á Jarnbardi at taka lut í hesari kapping. Tískil vendu tær sær til manningina á Páll Fanga úr Klaksvík, ið gjørdist nummar tvey og onkran annan bát, so at tær fingu manning til at taka lut á Scilly-oyggjunum, greiður Kerstin Rasmussen frá.

Føroyska manningin hevur vant dúgliga her heima, áðrenn farið var til Scilly. Føroyingar hava fingið bátin Brendan at nýta til venjing her heima, men Kerstin Rasmussen sigur, at stórur munur var á Brendan og so Atlantic, ið tær róðu í niðri á Scilly-oyggjunum. Hon sigur, at Brendan er væl tyngri og breiðari enn Atlantic, sum er líkur øllum hinum bátunum, ið kappast verður í á Scilly. Eisini er árarnar heilt øðrvísi umborð á Brendan, enn tær eru á bátunum, ið tóku lut í stóru kappingini.



*Føroyska manningin, sum tók lut í kappróðrinum á Scilly-oyggjunum. Frá vinstru: Eivy Olsen, Kristianna Øster, Kerstin Rasmussen, Anna Mohr, Petra Hansen, Rannvá Madsdóttir, Jannie Dam Jacobsen. Anna Mohr situr við málninginum, ið hon sjálv hevur málað, og sum Richard Hardman fekk í gávu frá føroysku kvinnunum sum tøkk fyri stuðulin*

*Mynd: Richard Hardman*

### Góðar umstøður at rógva

Føroyska manningin kom til Scilly miðskeiðis í farnu viku, men vegna vánaligar venjingarumstøður bar ikk til at flota Atlantic fyrr enn fríggjadagin. Tað merktist sjálvsagt, at føroysku kvinnurnar ikki høvdu so góða tíð at venja seg við bátin, og hetta var kanska ein av orsøkunum til, at tað ikki gekk so væl leygardagin sum sunnudagin.

Tá ið Atlantic róði tann róðurin leygarmorgunin, fingu tær ein sera vánaligan start, tí tær sóu ikki startflaggið og komu tí alt ov seint avstað. Tað gekk tó ikki heilt galið, tí føroyska manningin megnaði at rógva seg frá eitt tíggjunda pláss. Verri gekk seinni um dagin, tá ið næsti róður var á skránni. Kerstin Rasmussen sigur, at tann róðurin kiksaði fullkomiliga, tí tær fingu alt ov vánaligan start, og harafturat var taktikkurin hjá teimum við at rógva seigan róður heilt skeivur, tí tær komu ongantíð upp í ferð. Tær sóu tí tíðliga, at tær ikki megnaðu at halda seg í A-bólkinum, og tískil tóku tær sær av løttum seinastu 40 tøkini, sigur Kerstin.

Sunnudagin var søgan ein heilt onnur. Í finaluni í B-bólkinum gjørdu føroysku kvinnurnar brat, og tær vunnu bólkin við hálvari aðrari bátslongd aftur til nummar tvey. Kerstin Rasmussen sigur, at tær vóru øgiliga uppsettar upp á at vinna og harvið koma í A-finaluna, og tað eydnaðist teimum eisini.

Í finaluni í A-bólkinum gekk eisini væl. Føroysku kvinnurnar góvu alt tær áttu, og tað rakk til eitt sættapláss. Hetta vóru tær sum vera man ógvuliga fegnar um, tí tað merkti samstundis, at tær gjørdust nummar seks av samanlagt 90 bátum, og tað er eitt sera gott úrslit, heldur Kerstin Rasmussen.

### Hava sjálvar fíggjað ferðina

Tað er ikki sørt kostnaðarmikið hjá einari føroyskari bátsmanning at taka lut í kappingini á Scilly-oyggjunum. Kerstin Rasmussen sigur, at tær hava sjálvar útvegað alla fígging til ferðina. Tær hava søkt ymsar grunnar og fyritøkur um stuðul, og harafturat hava tær havt lutaseðlasølu, kakutombola og onnur tiltøk til tess at fáa pengar til ferðina. Hetta hevur verið ógvuliga strævið, sigur hon og leggur afturat, at tær sjálvar eisini hava goldið 200 krónur um mánaðin í part inn á bók síðani seinasta summar. Eisini hava tær fingið góðan stuðul frá Richard Hardman, fyrrverandi stjóra í Amerada Hess, sum var tann, ið legði lunnar undir føroyska luttøku í kappingini á Scilly, og sum tøkk fyri stuðulin fekk Richard Hardman ein málning, sum ein av rógvarunum á Atlantic, Anna Mohr, sjálv hevði málað.

Arbeiði við at útvega pengar hevur verið ógvuliga strævið hjá teimum sjey kvinnunum at útvega fíggingina, og Kerstin heldur, at tað er ógvuliga ivasamt, um nøkur føroysk bátsmanning aftur fer at vitja á Scilly, um tey sjálvi skulu standa fyri at útvega fígging til ferðina. Hon heldur tað verða stórt spell, at tað ikki longur er so, at túrurin er fíggjaður av øðrum, tá ið ein bátur vinnur sær rætt til at luttaka í stóru róðrarkappingini. Sjálv heldur Kerstin, at um tað framhaldandi skal verða so, at manningarnar sjálvur skulu útvega fígging, so var teirra vitjan helst tann seinasta av sínum slag á Scilly-oyggjunum.

### Fimm verða við Jarnbardi

Føroyska kvinnumanningin kom aftur til Føroya í gjár, og nú verður so farið undir at venja til FM-róðrarnar her heima. Kerstin Rasmussen sigur, at fimm av teimum sjey umborð á Atlantic rógva við Jarnbardi í ár, meðan ein er umborð á Páll Fanga. Tann seinasta hevur lagt árina frá sær og er farin undir lestur í Danmark.



*Róðurskvinnan Jannie Dam Jacobsen smílist, meðan hinar liggja skerflatar, nú tær júst eru komnar á mál*

*Mynd: Richard Hardman*